# Seldi Vesturfarið fyri slakar 11 mió krónur

**Manningin, sum var við Vesturfarinum, fylgir við skipinum og fyrrverandi eigarin, Dánial Aksel Dahl Olsen, er framvegis skipari**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vestmenningurin, Dánial Aksel Dahl Olsen, hevur selt trolbátin, Vesturfarið. Nýggjur eigari er Jógvan Páll Hammer, sum er ættaður úr Runavíkar-økinum, men búsitandi á Argjum.

Jógvan Páll eigur frammanundan gamla trolbátin, Niclas.

Manningin, sum var við Vesturfarinum, fylgir við skipinum, og Aksel er framhaldandi skipari. Tá ið Aksel er í landi, loysir bróðir hansara, Gunnar Dahl Olsen, av.

Við Vesturfarinum eru vanliga fýra mans, men onkran styttri túr hava teir verið tríggir.

Jógvan Páll hevur keypt alt felagið, Sp/f Vesturfarið, og keypsprísurin er slakar 11 mió krónur.

### Nøgdur við prísin

Seljarin, Dánial Aksel Dahl Olsen, heldur, at hetta er ein hampiliga góður prísur fyri felagið, men ikki nakar okursprísur í mun til aðrar líknandi sølur.

Vesturfarið er annar báturin, sum Aksel hevur havt við sama navni, og gamli báturin hevði bæði línu-og trolloyvi.

– Tá ið eg seldi gamla Vesturfarið til Viðareiðis, varð hann seldur við línuloyvinum, men eg hevði trolloyvi eftir. Gamla Vesturfarið eitur nú Vátiklettur. Báturin er bygdur í Fredrikssund í Danmark úr eik í 1946.

Í 2003 keypti Aksel nýggja Vesturfarið, sum er stálbygdur bátur í Fredrikshavn í Danmark í 1986.

– Hetta er ein góður og sera væl hildin bátur. Nú eg seldi, lovaði eg Jógvan Páll, at eg vildi verða við til at hjálpa honum í gongd.




*– Eg vænti, at vit í framtíðini fara at síggja meira og meira til, at loyvir ver›a løgd saman, sigur Dánial Aksel Dahl Olsen*

*Mynd: Skipalistin*

### Trongdist um

Aksel heldur, at tað er vorðið alt meira trupult at leggja eitt fiskiár til rættis, tí dagarnir, sum hesir bátar hava, eru so fáir. Tá hann so fekk eitt hamiligt boð, avgjørdi hann at selja.

– Eg vænti, at vit í framtíðini fara at síggja meira og meira til, at loyvir verða løgd saman. Ein bátur sum Vesturfarið skal helst ikki hava nógv minni enn einar 150 fiskidagar um árið. Vesturfarið hevur 86 fiskidagar, og eg haldi, at Niclas hevur einar 70.

Hann væntar, at nýggi eigarin sum frá líður fer at leggja loyvini saman.

– Vit hava áður keypt dagar frá partrolarunum, men eisini hjá teimum er farið at treingjast um, sigur hann.

### Hann keypti...

Dánial Aksel Dahl Olsen vísir á, at hann og Jógvan Páll Hammer, sum annars kennast væl, eisini høvdu tosað saman um aðrar møguleikar.

– Tað hevur eisini verið upp á tal, at eg skuldi keypa trolbátin hjá honum, Niclas, men Jógvan Páll er nakað yngri enn eg, og úrslitið gjørdist, at hann keypti mítt felag í staðin, sigur hann.

**FAKTA**

**Vesturfarið**

| | |
|---|---|
| **Smíðistaður/ár:** | Fredrikshavn, DK 1986 |
| **Tilfar:** | Stál |
| **Maskina:** | Volvo Penta 366 hk (2002) |
| **Longd:** | 17,38 m |
| **Breidd:** | 4,81 m |
| **BT:** | 60,3 |

**FAKTA**

**Niclas**

| | |
|---|---|
| **Smíðistaður/ ár:** | Assens, DK (1968) |
| **Tilfar:** | Eik |
| **Maskina:** | MAN 425 hk (1988) |
| **Longd:** | 20,15 m |
| **Breidd:** | 5,15 |
| **BRT:** | 45,67 |

# Orkaði ikki at hoyra frøðingarnar meira



**– Tað er vorðið meira og meira trupult at leggja eitt fiskiár til rættis. Dagarnir eru so fáir, og við tilmælum um uppaftur størri skerjingar og avgjøld, orkaði eg slett ikki at hoyra hesar fiskifrøðingarnar og búskaparfrøðingarnar meira, sigur Dánial Aksel Dahl Olsen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vesturfarið, sum Dánial Aksel Dahl Olsen nú hevur selt Jógvani Páll Hammer, eigur 86 fiskidagar. Tað er ikki nógv hjá skipi og manning, um nakað skal fáast burtur úr.

### Eg orkaði ikki..

Vit hava spurt Aksel, hvør veruliga orsøkin var til, at hann avgjørdi at selja:

– Eg haldi, at tað rættiliga er farið at treingjast saman um við fiskidøgum, og útlitini frameftir eru ikki góð, soleiðis sum vit aftur og aftur hoyra fiskifrøðingar og búskaparfrøðingar tosa. Tá ið eg so fekk eitt nøktandi boð, avgjørdi eg at selja.

Aksel dylur ikki, at hann eisini var vorðin rættiliga troyttur av at hoyra fiskifrøðingar tala fyri skerjingum – og búskaparfrøðingar tala fyri avgjøldum fyri at sleppa at fiska.

– Eg orkaði veruliga ikki at hava skip og samstundis hoyra hesar frøðingar tosa um skerjingar og avgjøld.

### Fólksins ogn

Aksel vísir á, at búskaparfrøðingar og onnur aftur og aftur tosa um »fólksins ogn«.

– Tað er heilt ótrúliga strævið at lurta eftir slíkum hjá okkum, sum hava verið á sjónum, síðan vit vóru 15 ára gamlir, sigur hann.

Sum Aksel nevndi, hevur Vesturfarið 86 fiskidagar og tosað verður um at skerja dagatalið uppaftur meira. Við hesi gongd og tí hugburði, sum ræður, kundu vit vænta, at vit umsíðir bara sita eftir við helminginum av hesum døgum.

– Hvat høvdu fiskifrøðingar og búskaparfrøðingar sagt, um teir bara sluppu til arbeiðis í 43 dagar um árið – og at lønin hjá teimum var hareftir, spyr hann.

### Alt við "storm"

Aksel vísir á, at tá ið hesir frøðingar hava sitið á skúlabeinki í nøkur ár, koma teir heimaftur og skulu taka samfelagið við "storm", sum hann tekur til.

– Og omaná alt fáa teir aðrar akademikarar at hoppa upp á tað, sum teir koma við, leggur hann aftrat.

Fyrrverandi skipaeigarin sigur, at fiskifrøðingar bara tosa um skerjingar, og tú hoyrir ongantíð, at talan er um at geva skipum og bátum nakrar av mistu døgunum aftur.

### Ber ikki til

– Tað ber slett ikki til at reka vinnu undir slíkum umstøðum – og við verandi hugburði um skerjingar og avgjøld, stúri eg fyri, at tann dagur kemur, at alt veiðiliðið fer á húsagang, sigur hann.

Dánial Aksel Dahl Olsen væntar, at úrslitið av øllum hesum verður, at loyvir verða løgd saman, og so fáa vit at síggja, hvussu nýggja veiðimystrið fer at síggja út – og hvussu sunt tað verður fyri samfelagið.